## Føroyskur ítróttur í framtíðini

Leygardagin 10. november kl 10 til 18 fer Ítróttasamband Føroya at halda ein evnisdag á Hotel Føroyum. Ætlanin við hesum degi er at seta føroyskan ítrótt í brennidepilin, og saman finna útav hvørjum málum vit skulu arbeiða framímóti.

## Kvinnulandsliðið venur á Eiði

Vikuskiftið 27. og 28. oktober venur nýggi bruttohópurin hjá kvinnum í Ítróttarhøllini á Eiði. Venjingarnar byrja leygarmorgunin kl. 10 og enda við venjingardysti sunnudagin 28. oktober kl. 15:00. Hetta er liður í fyrireikingunum hjá kvinnulandsliðnum til landsdystirnar móti Íslandi síðst í november. SunSet dystirnir, ið vóru settir til hetta vikuskiftið, eru allir fluttir.

# Gongur svingandi hjá VB

**VB vann móti Stjørnuni, men tapti móti StÍF. Í útsetta dystinum móti Stjørnuni í Vági, vann VB ein kanóndyst móti Stjørnuni, men dagin eftir taptu tær móti StÍF á útivølli. – Dysturin kvøldið fyri hevur óivað ligið í beinunum hjá ogra leikarum, tá tær fóru inn á Skálafjørðin sunnudagin, sigur Bogi Mortensen, heimildarmaðurin av Skála, hendan dagin**



*Laila og Ruth royna at seðga Unu, meðan Svava hyggur at*

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

VB og Stjørnan spældu ein fysiskt krevjandi dyst leygardagin 20. oktobur, har kvinnurnar úr Vági megnaðu at koppa meistarunum úr Klaksvík, við einum 26-24 sigri, aftaná hálvleiksstøðuna 12-8.

### Stjørnubyrjan

Stjørnan kom annars best frá byrjan og løgdu seg á odda 0-2, men so raknaði VB við og løgdu seg á odda. Støðuna hildu vágskvinnur og vóru tær frammanfyri allan fyrra hálvleik. Gamaní javnaði Stjørnan í tveimum førum, til ávíkavist 3-3 og til 8-8, men VB endaði omaná, fingu fýra mál afturat, og so var hálvleikur.

### Lyklaleikarar

Lyklaleikarar hjá VB høvdu ein góðan dag á Vágseiði leygardagin, og Daiva Toumaite, Laila Jespersen, Gurið Mortensen traðkaðu virkuliga í karakter og vunnu dystin fyri VB.

### Viljin sigraði

Stjørnan megnaði at javna til 18-18, tá annar hálvleikur var hálvrunnin, og løgdu seg enntá á odda 21-22, men so var tað sum at støðgur kom í hjá klaksvíkskvinnum, tí hóast útvísingar til VB móti dystarenda, megnaðu vágskvinnur at enda at vinna við tveimum málum.

### Dagin eftir

Eftir ein harðan dyst leygardagin, fóru vágskvinnur inn á Skála at spæla móti StÍF. Dystarferðin var lítil og málini enn færri, og týðuligt var at síggja, at beinini á Vágskvinnum vóru tung frá dystinum leygardagin. Hvussu var og ikki, so royndu tær, hvat tær vóru mentar.

StÍF, ið vóru stjørnuskotið Ninnu Johansen fyri uttan, løgdu seg á odda og gongdin var jøvn, inntil støðan var 3-3, tí tá var Daiva so óheppin at fáa ein alboga í andlitið og noyddist tískil av vøllinum til viðgerðar. Hon fekk ein snudd yvir eygnalokinum, og kom ikki inn í dystin aftur, fyrr enn umleið 10 minuttir vóru farnir av øðrum hálvleiki. Hesa løtuna, Daiva var úti, megnaðu StÍF at vinna sær passaligan fyrimun, men tó kempaðu vágskvinnur fyrimyndarliga, sjálvt um lítið kom burturúr. Hálvleiksstøðan varð 7-5.

### Kreftirnar gingu undan

Meðan Daiva hevði verið úti við skaða, vóru kreftirnar á hinum VB-arunum uppbrúktar, so tá hon kom inn aftur, var tað ein einmansherður móti stinnu StÍF verjuni, sum gjørdu sær dælt av hesum og kempaðu seg til eina fína føring uppá 12-9, eftir 18 minuttum í øðrum hálvleiki. VB gjørdi eitt síðsta sprell og kom uppá javnleik 12-12 tá seks minuttir írestaðu, men tá var øll orkan nýtt, og tá so StÍF skorar til 13-12, minuttin seinni, megnar VB ikki nakað aftursvar, og tískil vinnur StÍF ein heldur linligan dyst, hvat tempo viðvíkur.

## FAKTA

**VB – Stjørnan 26-24 (12-8)**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 12 (3), Laila Jespersen 4, Ruth Lisberg 4, Monika Samuelsen 3, Theresa Joensen 3
**Stjørnan:** Simona Petersen 11 (5), Bára S. Klakstein 4, Durita Christophersen 4, Una Olsen 2, Joan M. Djordjevic 1, Hanna Mikkelsen 1, Anna K. Samson 1
**Brotskøst:** VB 3, Stjørnan 6
**Útvísingar:** VB 2, Stjørnan 3
**Dómarar:** Hans Tomasen & Hanus Kúrberg

**StÍF – VB 13-12 (7-5)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 7 (2), Bára Danielsen 3, Ata Gregerssen 1, F. Danielsen 1 Elsa H. Rasmussen 1
**VB:** Svava Vestergaard 5, Daiva Toumaite 4 (2), Bára Mortensen 1, Miriam Michelsen 1, Monika Samuelsen 1
**Brotskøst:** StÍF 2, VB 3
**Útvísingar:** StÍF 3, VB 1 (venjarin)
Dómarar: Kristian Joensen & Karstin Joensen

# Challenge Trophy Cup 2007

**Sunnudagin 21. oktober fór A-manslandsliðið til Danmarkar, og týsdagin gekk leiðin víðari til Luksemburg til Challenge Trophy kappingina, ið byrjar í dag 24. oktobur**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Føroyska manslandsliðið í hondbólti fer í kjalavørinum hjá kvinnulandsliðinum, at luttaka í Challenge Trophy Cup. Hetta er ein kapping, ætlað smátjóðum innan hondbólts ítróttina. Kappingin byrjar í dag, 23. og er liðug sunnudagin, 28.

Ferðalagið fór longu úr Føroyum sunnudagin 21. og steðgaðu teir í Helsingør, har tveir av okkara leikarum spæla til dagligt. Fyri at samansjóva hópin, spældu okkara menn ein venjingardyst móti Helsingør3000, har okkara vunnu 32-29, eftir hálvleiksstøðuna 15-15.

Vónirnar hjá okkara monnum eru ikki heilt sørar.

Kappingin er deild í 2 kappingar. Ein í Luxemburg og ein í Georgia. Okkara kapping er deild í tveir bólkar, har nr eitt og tvey koma víðari úr hvørjum bólki. Okkara menn hava ivasaman kunnleika til mótstøðuliðini í bólki sínum, og teir meta at tað skuldi verið møguligt at vunnið sær eitt annað pláss í bólkinum, og tessvegna komið í hálvfinaluna.

Vinnarin av kappingini í Luxemburg og vinnarin av kappingini í Georgia skulu møtasat í einari finalu, ið er ætlað sum ein eyka vinningur. Tí hendan finalan skal spælast sum ein upphitingar dystur til EM-finaluna 2008 í Drammen í Noregi.



Dystarskráin hjá føroyska manslandsliðnum sær soleiðis út:

| | |
|---|---|
| 24/10 kl. 17:00 | Føroyar - Malta |
| 25/10 kl. 15:00 | Írland - Føroyar |
| 26/10 kl. 15:00 | Føroyar - Skotland |
| 27/10 kl. 15:00 | Føroyar - England |
| 28/10 kl. 12:30 | Luksemburg - Føroyar |

Luxemburg er 1 tíma framman fyri okkum.